# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sópa ES-málið inn undir teppið!

Tað hevur mangan verið havt á lofti, at fara Ísland og Noreg uppí ES, so eru Føroyar staddar í heilt nýggjari støðu. Orsøkirnar til hesa áskoðan eru politiskar so væl sum búskaparligar. Andstøðan móti ES í Føroyum hevur fyrst og fremst nakað at gera við, at vit eru fiskiveiðitjóð. Hugmyndin um Føroyar í ríkjasambandi við ovurstórar fiskiveiðitjóðir sum Frakland, Spania, Bretland og Týskland hevur ikki verið hugalig hjá føroysku fiskivinnuni. Eftir eitt hart politiskt stríð í áratíggjur um føroyska sjómarkið hevur hugurin at býta okkara fiskitilfeingi við onnur lond verið lítil.

Tað er væl skiljandi, at vinnan er ivandi í ES málinum og breið semja hevur verið um, at limaskapur er ikki nakað alternativ. Hartil koma so allir ivaspurningarnir í sambandi við ríkisfelagskapin. Tann breiða semjan um ES málið hevur tó havt ta óhepnu fylgju, at annað samstarv við ES eitt nú samstarv innan gransking, útbúgving og mentan hevur ligið á láni her hjá okkum, meðan lond, sum vit kappast við og sum vit vanliga samanbera okkum við støðugt veksa um samstarvið í hesum økjum. Henda støða hevur elvt til broytingar í hugburðinum hjá mongum mótvegis ES og nógvar royndir hava tí seinastu árini verið at fáa í lag eitt nú granskingarsamstarv innan karmarnar av tí fríhandilsavtalu, ið Føroyar hava við ES. Við granskingarsamstarvinum sigst gongd at vera komin á, meðan undirvísingar- og mentanarsamstarvið stendur í botni.

Innan føroyskt vinnulív er nú vaksandi áhugi fyri einum øðrvísi tilknýti til ES og eitt støðugt økt trýst hevur so ført til enn eina serfrøðinganevnd at greina alt ES málið enn einaferð.Vit hava áður her nevnt, at tað er torført at ímynda sær, hvat nýtt enn ein serfrøðinganevnd kann tilføra ES málinum. Spurningurin er um seinasta serfrøðinganevndin ikki fyrst og fremst er enn ein roynd at parkera ES málið, tí ósemjan í samgonguni er stór um hetta mál. Flestallir føroyingar uttan uttanríkisráðharrin munnu vera samdir um, at við nýggja íslendska ES politikkinum eru fortreytir okkara við atliti at ES grundleggjandi broyttar. Tað mundi vera fáur, sum bert fyri hálvum ári síðan dugdi at ímynda sær, at Ísland við eitt fór at broyta uttanríkispolitikk og søkja um ES limaskap. Tað er tí eitt sindur løgið, at utttanríkisráðharrin alt fyri eitt staðfestir, at ongar fortreytir eru broyttar. Spurningurin er, um hetta ikki er enn ein roynd at sópa eitt trupult politiskt mál inn undir gólvteppið. Møguliga kann serfrøðinganevndin geva okkum okkurt heilt nýtt um ES, men ES málið er nú eftir íslendsku kúvendingina fyrst og fremst eitt politiskt mál, og eigur at verða viðgjørt sum eitt politiskt mál. Tað ber væl til at byrja eitt føroyskt politiskt orðaskifti her og nú uttan enn eitt serfrøðingaálit. Hetta, at ein av okkara fremstu kappingarneytum nú søkir um ES limaskap átti at fingið løgting og landsstýri á vøllin beinanvegin, tí hetta mál er nú við grundleggjandi broyttum fortreytum meira eitt mál fyri politikkarar enn fyri serfrøðingar.

**Sosialurin**

## Alilógin og væntandi virðing

BJØRT SAMUELSEN



Alivinnan er í dag sera væl rikin. Hon kastar nógv av sær – bæði til samfelagið og til vinnuna. Tað er ómetaliga umráðandi, at tá broytingar verða gjørdar í alilógini, so verður tað gjørt skipað, væl fyrireikað og við so breiðari politiskari undirtøku, sum til ber.

Alilógin er bert eitt av fleiri dømum um sera prinsipiellar og týdningarmiklar lógir, ið verða trýstar ígjøgnum Løgtingið í løtuni, uttan nakra veruliga viðgerð. Málið hevur alt ov stóran týdning til at verða druknað í runublaking sum Bill Justinussen í blaðgrein ger, við sínum ósakligu álopum á Tjóðveldi.

Í sambandi við nýggju alilógina eru nógvir spurningar, sum áttu at fingið djúptøkna viðgerð, ikki minst spurningurin um fyrimunir og vansar við at flyta eigaramarkið frá 25% til 50%, soleiðis at tvær fyritøkur einsamallar kunnu eiga øll aliloyvini í Føroyum. Uppskotið fokuserar uppá fyrimunirnar, sum sjálvandi eru, men viðgerð stórt sæð ikki vansarnar.

Hvørjar samfelagsbúskaparligar avleiðingar hava broytingarnar, ið gjørdar verða, og hvussu nógv økir tað um møguleikan fyri, at útlendingar keypa upp føroysku alivinnuna?

Hvørjar eru avleiðingarnar, um ein fyritøka, sum eigur helvtina av føroysku alivinnuni, kemur í fíggjarligar trupulleikar?

Hvussu ávirkar duopolstøða í alivinnuni alla undirveitaravinnuna?

Skal landsstýrismaðurin hava so víðar kunngerðarheimildir, sum lagt verður upp til?

Skulu alarar kunna leiga økini út? (lógin sigur bæði nei og kortini ja, um landsstýrismaðurin metir at fyritøkurnar hava tørv á tí). Eisini kann hann gera undantak frá 50% eigaramarkinum, og átti tað so yvirhøvur at verið har? Og hvussu við endurgjaldi til alarar, sum missa loyvið?

Her eru ómetaliga nógvir spurningar, sum hava fingið sera lítla, og summir als onga viðgerð. Í viðmerkingunum verður fyri ferðir víst til okkara fremsta kappingarneyta - Norra. Men í Norra gjalda alarar milliónir í loyvisgjaldi umframt eitt promilluavgjald av øllum útfluttum fiski – pengar sum fara til útflutningsmenning og gransking. Heldur ikki hendan viðkomandi spurning er nomið við, og her verður trupult at koma afturumaftur.

Í uppskotinum frá landsstýrismanninum er lagt upp til at privatisera firðir og sund, tí loyvini gerast í roynd og veru rullandi, og tá hevði tað verið sera trupult fyri landið at lagt um ella broytt nakað sum helst í allari framtíð. Í skrivandi stund sær tað tíbetur út til, at Løgtingið fer at binda fyri hesa sera óhepnu áseting.

Alivinnan hevur ment seg til eina sterka og sunna vinnu, sum kastar nógv av sær í mun til støddina, og tí hyggja útlendingar við vaksandi áhuga hendanvegin. Ongar metingar eru gjørdar av hvussu ætlaðu broytingarnar verða til fyrimuns ella ófyrimuns fyri vinnuna, og fyri samfelagið í longdini.

Eg havi staðiliga mælt frá at gera so stórar broytingar uttan at málið hevur fingið tað viðgerð tað eigur. Natúrligt nokk tekur vinnan undir við at so fáar avmarkingar eru sum til ber. Men vit politikarar hava eina heilt aðra uppgávu. Vit skulu í øllum lógarsmíði taka atlit til vinnuna, men vit skulu eisini hugsa mest møguligt samfelagsgagn inn í lógirnar og hugsa bæði 20, 50 og enn longri fram í tíðina. Mín fatan er avgjørt ikki, at alivinnan sum heild er so ótolin eftir hesum broytingum, at lógin ikki kann bíða til hon hevur verið til eina veruliga viðgerð.

At málið upprunaliga ikki hevur havt so stóran skund fyri landsstýrismannin er skilligt, tí útkast til lógina varð klárt á heysti í fjør, og hoyringssvørini komin í Vinnumálaráðið longu í januar. Kortini verður lógin ikki løgd fyri Løgtingið fyrr enn seinast í apríl – 7 vikur eftir framløgurfreistina, og skal avgreiðast í hesi vikuni, nú sum samgongan hevur avgjørt at víkja frá øllum tíðarfreistum, so talan verður um reina samlibandsatkvøðuavgreiðslu.

Tað er grundleggjandi mangul uppá virðing fyri arbeiðinum hjá nevndini, sum í trý ár hevur arbeitt við málinum. Tað er væntandi virðing fyri Løgtinginum og tað eisini væntandi virðing fyri vinnuni.

## Ein stutt heilsan til Norðborg - og nakað av hugarensli

SJÚRDUR JACOBSEN
Á fiskileið í Vesturgrønlandi

Nýggja Nordborg er komin til lands. Siglandi tann langa vegin úr Suðuramerika. Hvat dregur menn til at fara í holt vid sovorðna stóra og á pappírinum ótrygga verkætlan? Jú, tað er dirvi, álit á sær sjálvum og ikki minst dugnaskapur. Veiðimenn. Tað er hettar sum øll samfeløg hava brúk fyri. Veiðimenn á øllum økjum. Ikki eru teir lættir at skilja hjá tí vanliga pappírvendaranum, og ei heldur skilir veiðimadurin byrokratin. Soleidis er tað bara. Veiðimaðurin vassar á dýpi, har hann ikki grynnur, men sum oftast lukkast honum á ein ella annan hátt at koma á turt aftur. Stóri trupulleikin er, at hettar fólkaslagið fækkast.

Hví?

Tí tað verður stappað í høvdið á børnum líka frá vøggu í grøv, hvussu týdningarmikið ta er at hava eina trygga tilveru. Færri og færri tora at slíta seg leysan. Og tann sum torir, skal hava harða húð fyri at standa ímóti ágangi frá fjøldini. Fjøldin skapar so einki. Í veruleikanum eru tað einstaklingarnir, sum skapa virðini í hesum samfeløgum, sum vit hava valt at liva í. Fjøldin má bara fylgja við.

Kenni ikki hesar menn, sum hava bygt Nordborg, men havi eygleitt teir upp á fjarstødu.

Úrmælingar.

Tá ringast stóð til, sigldu teir hinumegin klótuna fyri at fáa endarnar at røkka saman. Slíkt eru menn. Hettar ediliga skip er ein veldigur aktivitetur fyri Føroya Land við tí stóru virðisøkingini av tí pelagiska tilfeinginum, sum nú einaferð er vorðið so innskrenkað.

Tað liggur ein stór ábyrgd á politikarunum at skapa so víðar karmar sum gjørligt til hettar skip.

**Gódan byrð.**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.